





»Hvør er luturin á jólatrænum, sum bert ein finst av!«



Innleiðing

Nú er stundin skjótt komin at keypa sær jólatræ, so í dag fara vit at gera pynt til jólatræið. Blóman og ketan eru gamalt jólatræspynt frá 1800-talinum; og fiskurin er pynt úr Pólandi. Men ein fiskur á jólatrænum hóskar jú eisini sera væl til eitt føroyskt jólatræ! Eina kurv hevur tú óivað roynt at gjørt áður; men kanska ikki hetta slagið, sum vit vísa tær í dag; tí hesa kanst tú gera uttan at nýta lím ella klistriband. Bert honkin skal límast á. Kurvin er sera løtt at gera, hóast tað kanska sær trupult út á tekningunum. Tú kanst fylla hana við góðgæti, áðrenn tú hongur hana á træið.

Jólasøguna í dag hevur H. C. Andersen skrivað í 1846. Um tað mundið kom siðurin við jólatrøum til Danmarkar úr Týsklandi. Tú fert kanska at leggja til merkis, at ljósini á jólatrænum í søguni eru reyð, hvít og blá. Tað er tí at søgan gongur fyri seg í Slesvig-Holstein, sum hevði valt reytt, hvítt og blátt at umboða seg.

Nú er longu triði sunnudagur í advent í morgin, og vit hava tendrað trý ljós í adventskransinum hjá okkum. Í ár eru fjórði sunnudagur í advent og jólaaftan á sama degi, so nú er bert ein vika eftir til jólini koma.


Heilsan

Elin & Annika

Keta

1) Legg eitt langt pappír saman (uml. 3 cm. breitt) og klipp tað út, sum víst á tekningini.

2) Brett pappírinum út aftur og hála tað út, so tað verður ein long keta. Tú kanst líma fleiri ketur saman, soleiðis at ketan røkkur fleiri ferðir rundan um jólatræið.





Kurv

Ger eina kurv, sum víst á tekningunum.

Nýtt eitt pappír, sum er 10+15 cm. til støddar.

Tá kurvin er liðug, límar tú eina honk á hana.





Fiskur

Legg eitt pappírsstykki saman, tekna fiskin á og klipp hann út (tekning nr. 1).

Brett pappírinum út aftur og brót aðruhvørja »táknu« oman ímóti tær (tekning nr. 2).

Vend fiskinum og brót restina av »táknunum« (tekning nr. 3.).

At enda vendir tú øllum »táknunum« út, so tær standa hornrættar út frá fiskinum.

Hang fiskin upp á træið í tunnum trái.


Blómur

Til hesar blómurnar skalt tú nýta metalfoliu ella aluminiumsfoliu.

1) Klipp blómubløðini við stelki út. Ger æðrar í bløðini við eini negl.

2) Klipp síðan sáðberini út.

3) og »pakka« teir inn í stelkin, sum víst á tekningini. Snara einum blómutrái (ella stáltrái) runt um stelkin og fest blómuna á træið við tránum.



JÓLAFYRIBRIGDI

Jólatræið

Í Suðurtýsklandi og Sveits høvdu tey fyri einum 500 árum síðan ein sermerktan sið: Á hvørjum ári áðrenn jólini settu handverkararnir eitt stórt granntræ uppi í handverkarasalinum. Trettanda dagin eftir jólamorgun varð tað pyntað við smágávum, og børnini hjá limunum komu at dansa um træið, sum tey at enda fingu loyvi at »heysta«.

Í 16. øld vita vit, at hesin siður var komin inn í heimini, tí forboð móti at fella granntrø byrjaðu at koma fyri í lógunum. T.d. var ein lóg, at hvør einstakur borgari ikki hevði loyvi at fella meira enn eitt træ í part um jólini. Vaktir vórðu eisini settar at ansa eftir viðarlundunum.


Ígjøgnum 19. og 20. øld er jólatræið vorðið vanligt í flestu kristnum londum. Serliga vóru tað prestar og lærarar, sum fyrst tóku siðin til sín. Men við tíðini varð tað eisini vanligt hjá fólki sum heild at hava eitt jólatræ sum miðdepil á jólum.

Fyri at leggja dent á tann kristiliga týdningin við jólatrænum varð í fyrstani ein jólaeingil settur á toppin. Og træið kallaðu tey »Kristustræið«. Stundum varð ein storkur settur í toppin; tá søgdu tey, at storkurin hevði verið við jólagávunum. Tað er ikki fyrr enn seinni, at ein stjørna (sjálvandi Betlehemsstjørnan) er vorðin vanligasti lutur at seta í toppin á jólatrænum.



JÓLAHALD Í FØROYUM FYRR

Jólatrø



Siðurin at hava jólatræ kemur úr Danmark. Flestu danir, so sum prestar og embætismenn, høvdu jólatræ, meðan jólatræið var ógvuliga óvanligt í teimum føroysku heimunum. So við og við gjørdist tað tó vanligari við granntræi. Fyrst mundu trøini koma til tey størru plássini.

John Nybo nevnir, at jólatræið hjá presti kom úr Klaksvík, haðani tey eisini sendu avlopstræ til Múla, tá ið okkurt mundi vera eftir aftan á, at sølan av granntrøum var endað.

Jólapynti var ikki nógv av hjá føroyingum. Kortini vóru fleiri, sum hildu »Familie-Journalen«, og haðani mundu tey onkuntíð fáa hugskotið at gera sær okkurt pappírsklipp.

At jólatræið var óvanligt í føroyskum húsum, lýsir henda hending, sum er frá aldaskiftinum: Við jóltíðir kom maður úr Danmark við skipi til Hvalvíkar, haðani hann gekk upp um fjøll til Vestmanna við kuffertinum í aðrari hondini og í hinari hevði hann … eitt jólatræ.

Sjálvt um fá jólagranntrø vóru millum føroyingar, var ikki óvanligt, at fólk tilvirkaðu síni egnu jólatrø, t.d. ein urtapott, sum varð pyntaður. Onkra granngreinina úr plantasjunum fingu tey eisini at pynta húsið við.

JÓLAHALD Í ØÐRUM LONDUM

Vesturtýskland

Í adventstíðini verða tveir minningardagar hildnir yvir Santa Barbaru og Santa Nikolaus. Tann fyrri er 4. desember. Tá verða greinar av frukt- og roynitrøum settar í vatn, so tær blóma jólaaftan. 6. desember er Santa Nikolaus dagur. Dagin fyri seta børnini bustaðar skógvar uttan fyri úthurðina, og um náttina leggur Nikolaus eitt ris við sjokulátu og smákøkum í teir. Nikolausdagin lata tvey tilkomin fólk í familjuni seg í sum Nikolaus og hjálparmaður hansara Knecht Ruprecht. Tey geva børnunum smáar gávur, sum tó fyrst mugu siga eina yrking ella syngja ein sang.

Jólatræið verður pyntað jólaaftan við m.a. eini stjørnu ella einum eingli í toppinum, og undir trænum verður ein krubba gjørd við 365 menniskja- og djóramyndum, einari fyri hvønn dag í árinum.

Aftan á jól eru fleiri halgidagar. 2. jóladagur er minningardagur Santa Stefanus, sum er verndarhalgimenni hestanna. Tá er ofta kappríðing. 3. jóladagur er minningardagur Jóhannus evangelist, har »Jóhannusvín« verður drukkið. Dagin eftir, »dag teirra sakleysu barna«, minnast tey barnamorðið í Betlehem. Tá verður eitt serstakt slag av køkum bakað, sum bert má etast henda dagin.

GRANNTRÆIÐ

Úti í skóginum stóð eitt so yndisligt granntræ. Rúmsátt var kring tað, sólin slapp framat. Luft var nóg mikið av, og íkring vaks ein hópur av hægri vinfólki, bæði grann og fura. Men tað lítla granntræið var so ótolið at vaksa. Tað hugsaði ikki um ta heitu sólina og ta frísku luftina. Tað legði einki í bóndabørnini, sum gingu og smámutlaðu, tá ið tey vóru úti og savnaðu jarðber ella hindber. Tíðum komu tey við eini fullari krukku ella høvdu jarðber, sum drigin vóru á strá. So settu tey seg við tað lítla træið og søgdu: »Nei, sum tað er lítið og snotiligt!« Tí vildi træið einki vita av.

Árið eftir var tað ein langan stelk hægri, og árið eftir hetta var stelkurin enn longri. Tí á einum granntræi ber altíð til at síggja á talinum av liðum, sum tað hevur, hvussu nógv ár, tað hevur vaksið.

»Á, hevði eg bert verið eitt líka stórt træ sum hini!« suffaði tað lítla træið, »so hevði eg kunnað breitt greinar mínar so langt íkring og við toppinum sæð út í ta víðu verð! Fuglarnir høvdu tá viljað bygt reiður millum greinar mínar, og tá ið vindur var, hevði eg nikkað eins hábærsliga sum hini!«

Tað hevði ongan stuttleika burtur úr sólini, fuglunum ella teimum reydligu skýggjunum, sum á morgni og kvøldi sigldu yvir tí.

Var vetur, og kavin lá glitrandi hvítur rundan um, kom ofta ein hara leypandi og sprakk tvørtur um tað lítla træið, – á, tað var so forargiligt! – men tveir vetrar fóru og triðja veturin var træið so stórt, at haran noyddist at fara rundan um tað. Á, vaksa, vaksa, at verða stórur og gamal var tó tað einasta frálíka í hesi verð, hugsaði træið.

Um heystið komu viðarhøggararnir altíð og feldu nøkur av teimum størstu trøunum. Hetta hendi hvørt árið, og tað unga granntræið, sum nú var hampuilga væl vaksið, skalv av hesum; tí tey stóru, stásiligu trøini duttu við ríkjan og brakan niður á jørðina. Greinarnar vórðu høgdar av. Tey sóu púra nakin, long og mjá út. Tey vóru næstan ikki at kenna aftur. Men so vóru tey løgd upp á vognar, og hesar drógu tey avstað út úr skóginum.

Hvagar mundu tey fara? Hvat mundi fara at henda við teimum?

Á vári, tá ið svalan og storkurin komu, spurdi træið tey: »Vita tit ikki, hvagar tey fóru? Møttu tit teimum ikki?«

Svalurnar vistu einki. Men storkurin sá hugsunarsamur út, nikkaði við høvdinum og segði: »Jú, tað haldi eg! Eg møtti nógvum nýggjum skipum, tá ið eg fleyg til Eyptalands. Á skipinum vóru bærilig mastratrø. Eg hugsi, at tað vóru tey. Tey luktaðu av grann. Eg skal heilsa so mangar ferðir«.

»Á, hevði eg bert eisini verið nóg stórur at flogið yvir um h av. Hvussu er tað eginliga, hetta hav, og hvørjum líkist tað?«

»Ja, hatta er so langrøkjut at greiða frá!« segði storkurin, og so fór hann.

»Fegnast yvir tí ungdóm!« søgdu sólargeislarnir, »frø teg um tín fríska gróður og um unga lív títt!«

Og vindurin kysti træið, og døggin táraði um tað, men hetta skilti granntræið ikki.



Um jóltíðir vórðu tey heilt ungu trøini feld, trø, sum ofta enn ikki vóru líka høg sum ella høvdu sama aldur sum hetta granntræið, sum hvørki hevði ró ella hvíld, men altíð vildi burtur. Hesi ungu trøini, og tey vóru júst tey allarvakrastu, sluppu at hava greinarnar. Tey vóru løgd á vognar, og hestar drógu tey síðan avstað út úr skóginum.

»Hvagar mundu tey fara?« spurdi granntræið. »Tey eru ikki hægri enn eg, enntá var eitt, sum var nógv minni; hví sluppu tey at hava greinarnar? Hvagar verða tey koyrd?«

»Tað vita vit! tað vita vit!« lótu gráspurvarnir. Niðri í býnum hava vit hugt inn gjøgnum rútarnar! Vit vita, hvagar tey fara! Á tey koma til ta fagrastu dýrd og glans, sum hugsast kann! Vit hava hugt inn gjøgnum vindeyguni og sæð, at tey verða plantað mitt í tí heitu stovuni og pyntað við teimum fagrastu lutum, bæði gyltum súreplum, hunangskøkum, leikum og fleiri hundrað ljósum«.

»Og so –?« spurdi granntræið og skalv við øllum greinunum. »Og so? Hvat hendir so?«

»Ja, meira hava vit ikki sæð! Tað var undurfult!«

»Man eg vara komin í verðina fyri at fara hesa glæsiligu leið?« fegnaðist træið. »Hetta er enn betri enn at fara yvir um hav! Sum mær leingist! Hevði tað bert verið jól! Nú eri eg høgur og fattur, eins og hini, sum vóru førd burtur síðsta ár! – Á, hevði eg bert ligið á vogninum longu! Hevði eg bert verið í heitu stovuni í skreyti og dýrd! Og síðan –? Ja, tá man okkurt enn betri, enn meira undurfagurt, fara at henda, hví skuldu tey annars farið at pyntað meg á slíkan hátt. Okkurt enn miklari, enn frálíkari man fara at henda –! Men hvat? Á, eg pínist sum mær leingist! Eg veit ikki sjálvur, hvussu vorðið er við mær«.

»Fegnast um meg!« søgdu bæði luftin og sólarljósið, frø teg um tín fríska ungdóm í skóginum!«

Men tað gleddist als ikki. Tað vaks og vaks. Vetur og summar var tað grønt. Myrkagrønt stóð tað har. Fólk, sum sóu tað, søgdu: »Hatta er eitt deiligt træ!« og um jóltíðir var tað felt fyrst av øllum. Øksin høgdi djúpt í gjøgnum merg og bein. Træið datt við einum suffi niður á jørðina. Tað kendi sviða og máttloysi og orkaði ikki at hugsa um nakra lukku. Tað var sorgarbundið, tí tað skuldi fara frá heimi sínum, frá tí bletti, har tað var vaksið upp. Tað visti jú, at tað aldri meira fór at síggja tey kæru, gomlu vinfólkini, teir lítlu runnarnar og blómurnar, sum stóðu íkring tað, ja, kanska enn ikki fuglarnar. At fara hagani var als ikki hugaligt.

Framhald

Framhald